# í Miðlahúsinum



tetar á økinum, sum gingu beint í móti hesi 150-200 ára gomlu, sonevndu ”Markusar-hypotesuni”, og hesir kønu hildu - beint øvut: at Matteus evangeliið var eldri enn Markusar evangeliið (!). Og nokk um tað her.

Men – fyri at halda okkum til tann áðurnevnda metaforin hjá Sølvará um útviklingslæruna – so hava kanska teir ídnu bibliukritisku søgumenninir onkursvegna lært meiri av Darwin, gamla, enn teir sjálvir geva sær far um -?!. (Ein kampur fyri egnari tilveru?)

**Søgumaður**
Og gomul søgufatan kann væl ikki vera nakar eksaktur og alneyvur vitskapur, eins og kunstuppfatan og aðrar afturlítandi, trilvandi farleiðir. Tilfarið, sum her verður umrøtt, finst bara í størri og minni brotum, og spennir yvir 2 - 3000 ár, og sum liggja eini 2000 ár afturi í tíðini, og hetta tilfar inniheldur 66 bøkur, skrivaðar á bókrullur av o.u. 40 rithøvundum, og har ið sigst, og sum sagt áður, at einki upprunaskjal er funnið - enn.

Her áttu tey frøðiliga kritisku søgufólkini helst klæðiliga at erkent við sær sjálvum, at teirra trilvandi tankabygningur kanska hvílir á skroypiligum staraleggjum, og tí ikki komið við alt for avgerðandi og bombastiskum niðurstøðum.

Tí, skjótt er at stara seg blindan.Tak eitt nú John F. Kennedy, ið varð skotin í Dallas tann 22.11.1963 – forrestin júst sama dagin doyðu tveir aðrir framúr gávuríkir: C.S.Lewis, tann gløggi kristni professarin í miðaldarlitteraturi úr Oxford og Cambrigde, og tann bretski rithøvundurin, Aldous Huxley: ”Fagre nye verden”) – og hóast almikið var til av hjástøddum við hesa drápshending, so keglast menn enn um, hvør ið tað nú í veruleikanum var, sum framdi drápið á Kennedy. Konspirationshøvundarnir hava enn góðar dagar. Og vónandi kemur onkur søgumaður ikki - um onnur túsund ár - til ta niðurstøðu, (um verðin enn stendur tá), at so nógv ósamsvar er ímillum tær tá tøku keldurnar í bløðum og avhoyringum, at einki dráp er farið fram, og at Kennedy helst ongantíð hevur verið til - !?

**Kanska um hundrað ár -**
Ella eisini Oluf Palme, sum fall deyðiliga særdur av einum skoti aftanífrá á Sveavegnum tann 28.02.1986, klokkan 23:21, og seinna skotið streyk við konu hansara. Lisbet Palme vendi sær á og sá mannin, sum skeyt: Christer Pettersson. Men - Hann náði tú meg - eftir drúgvar juridiskar togtoganir av mongum hendinga heilum í fleiri rættarumførum, var útsøgn Lisbets undirkend m.a. tí, at revolvarin, sum eitt fellandi tekniskt prógv, ikki varð funnin. Revolvarin varð tó seinni funnin í einari á í 2006, men tá var sakin niðurløgd, tí tá var bartrogið Christer longu deyður í 2004. ( Og um Christer man vita seg aftur í verðina nú, um alt hetta kostnaðarliga og kostiliga ”kommersið” – tað veit eg ikki, men eg haldi – at so má hann onkursvegna halda um búkin og flenna í kíki at hesi hátíðarligu og sera seriøsu svensku, ørkymlaðu rættarskipanini.)

Men, nei, mín vinur, far ikki skeivur: tí søgurnar um morðið á Palme liva enn og illgitingarnar halda støðugt fram í okkara øld. Og alt hetta - nú søguliga tilfarið - kann væl ikki passa alt samalt. Og sum ger, so segði maðurin, at man nóg illa longur kann trúgva tí, sum stóð í ávísini frá í gjár -.

**Paradísið á jørð**
Mong, mong onnur dømi kundu verið tikin fram um møguligar søguligar villur í nýggjari tíð. Tað vóru eitt nú millum tey bestu høvdini í Danmark tá, sum hildu fast um, at okkara jarðiska ”Eden” var komið í stropa handan jarntjaldið, ja, nakað soleiðis sum Holger Drackmann meistarliga yrkti og droymdi um í 1871 í ”Engelske Socialister”- her eitt lítið brot:

Nu har vi hjernen og armen
tilbage,
Dem vi gemme til de kommende
dage.

De rive ham med sig, og han
tager ordet:

Vi er sønner af jorden, til jord
skal vi blive,
Vor løn vil vi have i levende live.

Og tey vitugu – eingin ivi um tað - avvístu blankt eitt nú frásøgurnar frá Alexander Solshenitsin um ”Oyggjahavið: Gulag”, sum ta beru propaganda, og hóast Solshenitsin var har á staðnum, sum eygnavitni, og sum í áravís kendi hesa tvørsøgnina á sínum egna kroppi.

Alt meðan tey einfaldu her heima í avbygdum: ”mykineskonan” og ”múlamaðurin” hildu í sínum stilla sinni, at tað ikki kundi vera so væl statt eystanfyri Berlinmúrin, táið tey, sum á nátt royndu at flýggja vestur um múrin - og út úr ”paradísinum” - blivu so gataði ígjøgnum av kúlum aftanífrá (!).

Hetta er als ikki sett fram her fyri at loysa nakra skruvu av ella særa nakran, men bara sum ein syrgilig og søgulig konstatering.

**Maria moy**
Aftur til hana. Eftir tíðarandanum tá á døgum - og sum er at finna summastaðni enn - man hetta vera sannlíkt: at var Maria ikki moyggj, sum sagt varð frá, at hon jú var, so kundi ella skuldi hon eftir lógini tá verðið steinað!

Men so varð ikki. Hennara trúlovaði , Jósef, góðtók hana og yvirnatúrligu frásøgn hennara, og eisini allir hennara kenningar. Og vanligt er, hóast alt, at táið eygnavitni og onnur hjástødd siga gott fyri einum veruleika ella atgerð, so vigar vitnisburður teirra nakað væl, og ið hvussu so er væl meiri enn, hvat ið onkur hissini fer at takast at forklára ella burturforklára um henda veruleika - eini 2000 ár seinni. Ella hvussu?

**Victor Danielsen (1894-1961)**
Havi hoyrt mangar talur á mongum fundum. Og summar sita eftir. Eg hoyrdi Victor, tað má hava verið um seinasta veturin hann livdi, hann stóð í bakborði oman móti sandinum í Betesda, og hann segði hetta:”Eg eri Gudi so takksamur fyri, at eg kundi – eg haldi hann brúkti vendingina: fekk náði til – at lesa Bíbliuna: uttan við brillum frá øðrum.” Soleiðis sum hann málbar seg.

Flestur vita, at Victor var framúr og eitt tað besta begávilsi, sum land okkara hevur fostrað. Tak bara hansara lívsverk. Hann livdi sum ein evangelistur, sum alt ið tað hugtakið rúmar, og hann hevði eisini mót og evni til:” - at tale Roma mitt ímot”, táið hann kendi tað vera rætt og neyðugt.

Jóannes Patursson segði um hann:” Hevði Victor verið sjálvstýrismaður, so høvdu vit langt síðani fingið sjálvstýri”. Og tí, til lukku - allir landsmenn og Hans Pauli Olsen - við tí meistaraverkið, sum í dag stendur í Fuglafirði. Tí varð Victor sjálvur spurdur, um hann vildi hava eina standmynd av sær, so hevði hann – tað vit kendu hann – nokk sagt:” Noy, takk”, og sum hann eisini segði til tilboðið um riddarakrossin. (Ja, við hvørt er tað betur, ikki at spyrja ov nógv -).

Tí hansara sikti var eitt heilt annað. Hann vildi tala:” - sonn orð við góðum skili” (Ápost. 26,25) Eg hoyrdi eina gentu úr Søldarfirði – har Victor ofta dámdi at vitjað aftur til - siga:” Um Victor var serliga djúpur og klókur? - Ja, tað veit eg ikki, tí eg forstóð alt, sum hann segði, men ikki alt tað sum hinir talarnir søgdu.” (Munur á monnum.)

**Og loksins hetta:**
Eg vænti, hóast hesi hissini boðabrotini hetta kvøldið, so fer tann gamli boðskapurin um ”Hin einsama Galilearan”, at standa sína roynd. Hann sum helt ta ómetaligu fjallataluna (Matt. 5-7), og sum einki hevði at halla høvdi Sínum at, men sum tó í evstu líðingarløtuni uggaði tann løstaða síðumannin við hesum orðum: ”Í dag skalt tú vera við Mær í paradísi!”

Og eg haldi eisini fyri vist, at boðskapurin um henda av sonnum ”Undurfulla Harra” fer at halda ímóti øllum álopum - bæði eftir at øll tey fortreffiligu, sum vóru hjástødd hetta kvøldið í Miðlahúsinum, og mín egna ótilstrekkiligheit - ikki eru meir.

22.01.2009